# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

Mitsubishi Outlander / Pajero:

# Tveir nýggir Mitsubishi “off-roadarar”



MITSUBISHI PAJERO

MITSUBISHI OUTLANDER

**Mitsubishi eru komir á marknaðin við tveimum nýggjum bilum. Annar er Outlander, sum eru sonevndur SUV, og hin er Pajero, ið er ein jeepur av tí góða gamla slagnum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Mitsubishi eru kendir fyri sínar 4x4 offroadarar, serliga frá ”Dakar Rally” har Mitsubishi Pajero er mest vinnandi bilmerki gjøgnum tíðina.

Í ár eru liðin 25 ár síðan Pajero fyrstu ferð kom á marknaðin. Í hesum sambandi eru teir komnir við einum heilt nýggjum Pajero, samstundis sum teir eisini eru komnir við nýggjum Mitsubishi Outlander, ið er sami bilur sum Peugeot 4007 og Citroën C-Crosser, ið seinni koma á marknaðin.

## Outlander

Nýggi Outlander er nakað størri enn forgangarin og fæst við upp til 7 sitiplássum.

Outlander er ein arbeiðsligur bilur við liðiligari og praktiskari innrætting, t.d. er baklúkan tvídeild, soleiðis at lessihæddin er sera lág (60 cm). Við einum knøtti í viðførisrúminum kunnu baksetrini ómakasleyst leggjast elektroniskt niður.

2.0 DI-D dieselmotorurin við 140 hk, ið er frá Volkswagen, passar við sínum snúningsmomenti upp á 310 Nm, væl til bilin soleiðis at hann er kvikur, orkar væl og hevur yvirskot av kraft.

Hóast Outlander er ein 4x4, ber til við einum knøtti at stilla um til at drívmegin einans er á forhjólunum. Outlander fæst bæði við 5 og 7 sitiplássum.

## Pajero

Mitsubishi Pajero er ein klassiskur jeepur, ið er kendur fyri sínar eginleikar uttan fyri vanliga koyrivegin, og har tað annars er óframkomiligt.

Við síni vekt upp á 2.310 kg er Pajero ein av ”tungu dreingjunum” innan jeepar. Hann verður gjørdur í tveimum støddum við trimum og fimm hurðum. Pajero við fimm hurðum kann draga ein viðfestisvogn upp til 3.000 kg.

Í nýggjastu útgávuni er Pajero ein sannur luksusbilur við leðurkabinu og nógvari útgerð.

Motorurin er ein 3.2 litur 4 syl. við 170 hk og einum snúningsmomenti upp á 373 Nm.

## Outlander og Pajero

Mitsubishi Outlander fæst í tveimum 2.0 DI-D útgávunum: Intense og Instyle (við 7 setrum), sum kosta ávikavist 350.000 (vøruvognur 279.000 v/mvg) og 399.000 (vøruvognur 299.000 v/mvg). Bilarnar eru sera væl útgjørdir, Intense útgávan hevur m.a. 18” alufelgur, heilautomatiskt klimaanlegg, leðurróðrur við innbygdari audiofjarstýring og fartpilot. Harafturat hevur Instyle útgávan leðurkabinu, Xenon lyktir framman, bluetooth og útv. stylingpakka o.m.a.

Mitsubishi Pajero kostar 520.000 (vøruvognur 384.000 v/mvg) í styttru útgávuni við trimum hurðum, og 535.000 (vøruvognur 408.000 v/mvg) í longru útgávuni. Í báðum førum er talan um Intense+ útgávuna við automatiskum girum og leðurkabinu.

Bilarnir kunnu síggjast og roynast hjá Ivan Johansen Bilum við Hoyvíksvegin.



*Outlander aftan. Leggið til merkis at baklúkan er í tveimum*



*Við einum knøtti í viðførisrúminum kunnu baksetrini ómakasleyst leggjast elektroniskt niður.*






*Outlander innan. Flott design*



*Pajero innan*